

# PINKUBØRN Í FERÐSLUNI

Í samstarvi við:

betri

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD





# Pinkubørn í bilinum

Ein pinkustólur er tryggasti háttur at flyta barnið. Hesin kann brúkast, frá at barnið er nýføtt.

Í pinkustólinum situr barnið við bakinum frameftir og er væl vart, um bilurin er fyri frontalum samanstoyti ella bráðsteðgi.

Eitt gott hugskot er at royna pinkustólin áðrenn fyrsta biltúrin við barninum.

Les nýtsluvegleiðingina gjølla fyri at tryggja tær, at bæði barn og pinkustólur eru rætt spent. Antin við isofix-festi ella við trygdarbeltinum.

## Stramma trygdarbeltið

Trygdarbeltið skal vera so stramt, at tú jústført eina flata hond millum beltið og barnið. Um trygdarbeltið ikki er nóg stramt, er vandi fyri, at beltið ikki megnar at halda barninum, um óhapp hendir. Snúður má ikki vera í trygdarbeltinum.

## Hvat sigur lógin?

Børn undir 135 cm skulu vera íbundin góðkendari trygdarútgerð, ið hóskar til vekt og hædd. Bilstólar í Føroyum skulu hava eina evropeiska góðkenning, t.e. eina E-góðkenning við ECE 44-03, ECE 44-04 ella i-Size.

Tað kostar eitt klipp í koyrikortið og eina bót, um børn undir 15 ár ikki eru rætt íbundin.

## Børn við serligum tørvi

Um barn títt er føtt ov tíðliga ella hevur heilsu-trupulleikar, kann verða neyðugt við eini loysn, har barnið liggur niðri. Tosa við læknan ella heilsufrøðingin, um tú ivast.

# Pinkustólur
## – ikki skaðiligur fyri ryggin

Summi foreldur ivast í, um ein pinkustólur er skaðiligur fyri ryggin. Um tú brúkar vanligt vit og skil, er hann ikki skaðiligur fyri ryggin á barninum. Men stólurin eigur bert at verða nýttur í bilinum – og ikki heima til tess at eitt nú sissa barnið.

Fara tit ein longri biltúr, er gott at halda ein steðg – til dømis annan hvønn tíma – og taka barnið úr stólinum. Svevur barnið, kanst tú flyta tað eitt sindur í stólinum viðhvørt, so tað ikki situr í nett somu støðu í ov langa tíð.

## Nær er barnið ov stórt til pinkustólin?

Barnið er vaksið úr pinkustólinum, tá høvdið kemur upp um kantin á stólinum, ella tá barnið vigar meira enn hámarkið, ið er merkt á stólinum. Hetta er vanliga, tá ið barnið er millum 8 og 13 mánaðir.

**Gev gætur:** Í i-Size bilstólum skulu børnini sita bakvend, til tey eru minst 15 mánaðir.

# Framman ella aftan?

Eru tit tvey vaksin í bilinum, setið tá barnið á baksetrið í pinkustólinum. So kann annar tykkara taka sær av barninum, meðan bilførarin hugsavnar seg um at koyra bil.

Koyrir tú einsamøll/einsamallur við barninum, kann tað vera ein fyrimunur at hava pinkustólin undir liðini á tær á framsetrinum. Men tá **skal** stoytkoddin á ferðafólkasíðuni gerast óvirkin.

## Halt ein steðg, um barnið er óróligt

Koyr til síðis, um barnið til dømis grætur. Koyr ikki víðari, fyrr enn støðan er góð aftur, og tú kanst hugsavna teg um at koyra bil.






# Til gongu við barnavogninum

Tá ið tú ert til gongu og fert yvir um ein veg, har útsýnið er ringt (t.d. av parkeraðum bilum), eigur tú at ganga frammanfyri og trilla vognin aftan á tær. Á henda hátt sært tú best, um frítt er at fara, áðrenn tú fert yvir um vegin.

## Tá eingin gongubreyt er

Gongur tú eftir einum vegi, har eingin gongubreyt er, skalt tú ganga í vinstru síðu – ímóti ferðsluni. Tá sært tú bilarnar, ið koma ímóti tær, og tú kanst flyta teg út á vegøkslina í góðari tíð.

## Ver sjónlig/ur í myrkri við barnavogninum

Tá ið tað er myrkt, kann tað vera trupult at síggja ein barnavogn í ferðsluni. Tú kanst gera barnavognin sjónligari við at seta endurskin á hjólini ella á sjálvan vognin.

Legg møguliga ein gulan endurskinsvest á skjólið á barnavogninum, so hann sæst langan veg. Tú kanst eisini sjálv/ur lata teg í ein endurskinsvest.

Tá ið bilførararnir síggja teg við stórari frástøðu, náa teir at seta ferðina niður í góðari tíð.

# Barnavogn í bussinum

Í flestu býarbussum kanst tú fáa barnavognin við, um tað er pláss.

Veittra til bussføraran, tá ið bussurin kemur til steðgistaðið. So veit hann, at tú fegin vilt við. Í summum bussum kann gólvið lækkast, so tað verður léttari at koma í og úr bussinum. Spyr føraran, um tað er pláss til barnavognin, áðrenn tú fert uppí.

Koyr barnavognin inn framman fyri tær og stilla hann á plássið, ið er sett av til høvið. Set bremsuna til, so vognurin ikki rullar aftur og fram, meðan bussurin koyrir.

Tá ið tú fert úr bussinum aftur, skal tú bíða, til hini ferðafólkini eru farin úr bussinum. Trilla síðan vognin aftan á tær. So fært tú betur stýrt barnavogninum, og tú sært betur, um tað er frítt at fara.

## Í bussi millum bygda

Skalt tú við bussi, ið koyrir millum bygda, skal trygdarbeltið altíð nýtast. Tak bilstólin við í bussin, og bint hann fastan við trygdarbeltinum. Minst til eisini at lata teg í trygdarbeltið.

Í bussum, ið koyra millum bygda, kann barnavognurin í flestu førum fara í viðførisrúmið.

## Ver sjónlig/ur í myrkri

Skalt tú við bussinum, tá ið tað er vorðið myrkt, hjálpir tað bussføraranum, um hann sær teg og barnavognin í góðari tíð. Ger teg og vognin sjónligan við endurskinum.









# Pinkubarn á súkklu

Pinkubørn kunnu ikki brúka súkkluhjálm, fyrr enn tey duga at sita sjálvi. Tað er vanliga um 9 mánaða aldur. Tá kunnu tey eisini sita í vanligum súkklusetri aftan ella framman á súkkluni.

Áðrenn barnið dugir at sita sjálvt, er ein vørusúkkla ella viðfestivognur ein møguleiki. Tá spennir tú barnið í ein pinkustól, ið er væl festur í lastini á súkkluni, soleiðis at stólurin ongan veg fer, um súkklan koppar. Handtakið á pinkustólinum skal vera uppi, eins og tá pinkustólurin verður borin. Á henda hátt kann handtakið taka ímóti einum stoyti og harvið verja barnið.

Koyr varliga og ansa eftir holum í vegnum.




**Her situr hjálmurin rætt**




**Her situr hjálmurin skeivt**

## Hvat sigur lógin?

Børn, ið eru við á súkklu hjá vaksnum, skulu vera trygt og væl spent føst, hava sítt egna sitipláss og vera vard soleiðis, at hendur og føtur ikki koma í hjólini.

# Tillukku við nýfødda barninum!

**Sum nýggj foreldur hava tit kanska spurningar um trygdina hjá børnum í ferðsluni.**

**Í hesum faldaranum hava vit savnað tey týdningarmestu ráðini um, hvussu tit koma trygt fram tað fyrsta árið: í bili, til gongu, í bussi og á súkklu.**

**Góðan túr í ferðsluni!**

sendistovan

Útgáva: Mai 2020

Tilfar brúkt við loyvi frá: RÅDET FOR SIKKER TRAFIK

Í samstarvi við:

betri

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

J. H. Schrøters gøta 7 · Postboks 3209 · 110 Tórshavn

Tel 220 064 · rff@rff.fo · **www.rff.fo**